gult10 cyan10 magenta10 svart10



# Endurspeglingar úr sálardýpum

**Røðan, sum Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í mentamálum helt, tá hann setti árligu málningaframsýningina hjá Lions í Eysturoy**



*Tórbjørn Jacobsen, mentamálaráðharri setti framsýningina hjá Lions í Eysturoy páskadag*

Kæra mannfjøld!

Veturin hevur ilt við at sleppa takinum. Várið kom ongantíð. Og summarmáli var ígjár. Eftir at hava verið og hjálpt vestmenningum við steypahandanini, nú landsins frægastu telvarar høvdu strítt seg fram til sigurs í dimbuldagavikuni, var eg og vitjaði ein vinmann uppi í Miðalsbrekku. Tá ið akað var heimaftur, brendi hann á við kavaælingi, ella vátaslettingi somikið, at ilt var at skoða framígjøgnum flykrurnar. Og ímorgun liggur kavin oman ímóti gørðunum. Men annars man alt verða við sítt gamla lag. Dagarnir leingjast í hvussu er og tað er onki sum longur kann forða Ljón-felagnum í Eysturoy at halda sína afturvendandi siðvenju, málningaframsýningina páskadag. Hesin stóri dagur í kristna heiminum, tá ið frelsarin reis uppaftur eftir blóðuga fríggjadagin tveir sólarringar frammanundan. Á 21´ ári er hendan málningaframsýningin vorðin ein so fastur táttur í lívinum hjá fólkinum herumleiðir og aðrastaðir, at tað er óhugsandi at eitt átak sum hetta nakrantíð fer at detta niðurfyri. Og væl verið tað.

Tað stóra talið av fólkið sum hevur vitja hesar framsýningarnar hesi seinastu 21 árini boðar okkum bara frá hvussu forkunnug tiltøk av hesum slagið eru, - her um okkara leiðir. Tað er ikki ov nógv sagt, at hendan framsýningin rann upp eins og runnur úr turrari jørð, sum Jesaja spámaður einaferð tók til eum ein gitnan eysturlending. Og hon hevur havt almiklan týðning. Fingið ferð á nógvar evnagóðar ungdómar og styrkt sjálvkensluna hjá uppaftur fleiri, ið fingust við at mála í tí dulda, - frammanundan.

Og list, hvat man nú tað vera fyri nakað? Endurspeglingar úr sálardýpinum? Ítriv sum dagdvølja? Ella okkurt heilt triðja?

Spurningurin er, um tað ikki býr ein listamaður í hvørjum einasta menniskja. Tað ræður bara um at finna ta rókina, sum hóskar hvørjum einstøkum. Bæði í verki og anda. Og at fara skeivur kann vera ein tung byrða at bera. Sum Magnus sigur um matgerðan umborð í Kongshavn: "Kokkurin skal bæði vera konufólk og brennivín, vikubløð, tíðindi, vinarlag, bygdartúnið og Áarvegurin. Maturin er tann "ið leiðirnar kann beina". Her má orðatakið sannast, at "vegurin til mansins hjarta gongur gjøgnum magan". Góðir kokkar fáa rós og kærleika, meðan vána kokkar ganga kryplaðir undir byrðuni av øllum heimsins syndum og vanlukkum." Og soleiðis man tað eisini vera við myndlistamonnum.

Listin fylgir í stóran mun samfelagnum hon livir í. Tað er ein av orsøkunum til, at myndlistin er so ung í Føroyum. Ytri umstøðurnar í bóndasamfelagnum góvu ikki húskallunum aðrar møguleikar enn at yrkja. Hevði tú hegni, kreftir og eitt gott minni, so bar tað til at fáast við orð og binda tey saman meðan togað varð í árarnar á út- & heimferð av útróðri. Og føroyingar hava í øldir givið sínum kenslum listarligan form í skaldskapi, kvøðing og dansi. Ikki við ljóðføristónleiki ella myndum. Og Guð havi lov halda føroyingar fram við at fara upp á gólv við hesum ríka og umfatandi fjølbroytta kvæðaskaldskapi, ið er málsins ótømandi kelda. Ígjøgnum hesa listina varð málið bjargað. Og føroyingurin. Hansara samleiki. Var málið ikki hingu vit ídag sum identitetsleysar snældur í globala turbulensinum. Málið er kjølfestan sum áhaldandi dregur okkum aftur á beint, og gevur okkum eina støðu í alheiminum.

Meðan skaldskapur, kvøðing, sangur og dansur hava djúpar røtur í fólkamentanini, ber ikki til at siga tað sama um myndlistina. Hetta hevur veruliga nakað við umstøður og búskap at gera. Gerandisdagurin var kravmikil og stríggin. Fólkið hevði sær nógmikið til at taka, fyri at fáa jarðarlívið at hanga saman annars. Og hvussu skuldi stór myndlist manast fram í myrkum roykstovum á moldgólvi.

Díðrikur á Skarvanesi, ið livdi frá 1802-1865, verður oftani tikin fram sum eitt vegamót. Hin nú so kendi fuglamálarin av Dímun. Húskallur í Kárastovu á Skarvanesi tað mesta av ævi síni. Tað finnast bara fimm myndir eftir hann ídag, og tær eru tíanbetur varðveittar á Listasvni Føroya. Tað er ein gáta hvussu hann fekk hendur á litum, pensli og pappíri, men tað ber so mangt til hjá honum ið brennir fyri eini sak. Og mýturnar um hendan serlingin eru ikki so fáar. M.a skal hann einaferð hava rikið eitt gamalt slitið ross út í Lítlavatn og hava skotið tað. Síðani settist hann at mála eina av sínum kendu myndum, ímeðan fuglarnir settust at piða ræði. So ikki kann sigast annað enn, at føroysk málningalist fekk ein dramatiskan elddóp.

Tjóðskaparrørslan tók seg síðani upp, so smátt, miðskeiðis í 19. øld, hugkveikt av romantiskum ráki innan av meginlandinum og av háskúlarørsluni. Vit hava øll hoyrt um hin tiltikna jólafundin í 1888, og nú byrjaði eitt drúgt mentanarstríð, sum í fyrsta lagi hevði til endamáls at tryggja rættindini hjá føroyska málinum sum móðurmáli, at vekja ansin fyri fólksins søgu og siðmenning. Skøldini gingu á odda í hesum samleikastríði, ið førdi við sær mentanarliga endurføðing og eitt nýtt blómandi listarligt virksemi. Og her gróði upp ein áður ókendur áhugi fyri teirri náttúru, tí landslagi, sum var grundarlagið undir føroysku fólkamentanini.

Myndlistin tók av álvara dik á seg. Motivini trutu ikki. Úr hvørjum køksvindeyga kundi íblástur fáast til stóra list. Ein óendaligur heimur opnaðist fyri gávaðum fólki. Ongastaðni í heimi finst eitt natúruscenario sum í Føroyum. Og evnaríkir menn og evnaríkar kvinnur, - lótu sær ikki siga.

Kringumstøðurnar norðalaga á Eysturoynni munna vera eitt eldorada fyri ein myndlistamann. Niels Kruse, ein serliga gávaður listarmaður, varð borðin í heim norðuri á Eiði í 1871. Hann verður sagdur at vera Føroya fyrsti landslagsmálari. Og longu í 1924 eyðnaðist honum at fáa málningin "Heystbrøgd" við á eina framsýning á Charlottenborg í Keypmannahavn. Málningurin lýsir brim eysturi á Møl á Eiði. Hann málaði í stóran mun lendið nærindis heimbygdini, og sagt verður at lýrisk náttúrukensla og alskur til landslagið eyðkenna oljumálningar hansara. Og havið – tey skiftandi litbrøgdini í aldugerðini – hava hansara serliga áhuga. Omma mín átti ein av málningum hansara, norður ígjøgnum Sundalagið og Flógvan. Hesin málningur hevði ein serligan status í hennara fínu stovu. Hann kendist sum eitt akker, ið gav stovuni eina serliga sál. Hetta eru minnir frá mínum barndómi.

Tað er eingin ivingur um, at tað varð ein sigur fyri føroyska málstríðið, at gjáarmenn megnaðu at halda kirkjuvígslu á føroyskum máli longu í 1929. Líka so óvanligt og kærkomið mundi tað vera, at Niels málaði gjáarmonnum eina altartalvu við føroyskum myndaevni. Har fer Kristus til gongu eftir sjónum. Ikki við miðeystursoyðimerkur, harið úlvaldar og asnar hvíla undir sveiggjandi pálmatrøum, og heldur ikki á Genezareth sjónum, men norðuri í Djúpunum, - á útróðrarleið hjá gjáarmonnum. Og har sita apostlarnir sum vanligir føroyskir útróðrarmenn í oljutroyggjum og roðklæðum, teir rógva í einum vanligum tíggjumannafari, og í baksýni hevja seg Kallurin og Borgarin, - røðir teirra upp ímóti himni.

Tað er ikki hent so lítið í føroyskari myndlist síðani. Hon er eisini farin út um landoddarnar. Er kend í stórum metropolum sum New York, París, Reykjavík og Keypmannahavn. Ein málningur hjá Mykinesmálaranum fór nú um dagarnar undir hamaran í Keypmannahavn fyr slakai 200.000 krónur. Tíanverri hendir hetta oftani ikk,i fyrrenn listarmaðurin sjálvur er farin úr sínum foldarlívi. Og júst Mykinesmálarin varð okkara fyrsti professionelli listarmaður. Hann valdi at bróta allar brýr, leyp út á dýpið, gjørdi listina til sína ófrávíkiligu lívsuppgávu. Og eingin ivingur er um, at eisini hann mátti gjalda ein dýran prís fyri hetta valið. Og nústaðni kemur virðingin. So tungur er hesin vegurin at ganga. Men avrikini eru til gagns, og hava alstóran týðning fyri føroyska mentan og føroyskan samleika.

Umstøðurnar hjá skapandi listafólki hava verið í lakara lagi. Eingin ivingur um tað. Vit hava líkasum ikki gáa nóg væl um hendan veruleikan, at hesi fólkini í skapandi og útinnandi listini, eru okkara salt og eggjan. Í Mentamálastýrinum verður nú løgd seinasta hond á fyrireikingarnar til ein lista- & tónlistaskúla, sum verður smíðaður í oynni harið Díðrikkur livdi sum húskallur og fuglamálari. Vónandi kemur hesin depil at verða føroyskari málningalist til íblásturs. Til tað er hann ætlaður.

Til tykkara ið sýna fram her ídag. Leiðin frameftir er tung, men haldi fram í góðum treysti. Og til seinast tøkk til Ljón-felagið í Eysturoy fyri at tit hava fingið hetta afturvendandi átakið í lag, og fyri at tit lata øllum ið ynskja tað, - rúm á tykkara bróstum. Bara soleiðis koma spírarnir undan, sum aðrastaðir verður køvdir í grovum filtrum.

Takk fyri.



*Alfred Olsen, løgtingsmaður og Tórbjørn Jacobsen, mentamálaráðharri á málningaframsýningini hjá Lions í Eysturoy páskadag*

gult11 cyan11 magenta11 svart11

ítróttur

Nr. 78 • mikudagur • 25. apríl 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Jákup og Todi stóra álitisváttan

**Michael Laudrup heldur báðar teir føroysku spælararnar í donsku superliguni vera millum teir bestu spælararnar í Danmark**

ÚTISETAR
*Jóannes Hansen*

Í blaðnum í gjár høvdu vit ein lítlan stubba um, at Michael Laudrup metti Toda Jónsson vera ímillum teir fremstu útlendingarnar í donskum fótbólti. Søgan hevði so uppruna í Ekstrablaðnum mánadagin, og hon varð skrivað í sku ndi út frá tí, sum mánamorgunin stóð at lesa í internet útgávuni av blaðnum.

Men søgan var – sæð við føroyskum eygum – uppaftur betri, enn tað, sum stóð í blaðnum í gjár.

Michael Laudrup hevði ikki bara Toda Jónsson á hesum landsliðnum, sum blaðið kallar tað. Men hann hevði eisini Jákup Mikkelsen ímillum teir fyrstu ellivu útlendingarnar.

## Tað verður lurtað

Nú er Michael Laudrup ikki hvør sum helst. Øll fótbóltshugað kenna og vita um avrikini hjá hesum fótbóltssnillinginum. Longu í 1982 kom hann upp í fremstu deildina í Danmark, sum tá var 1. deild. Tá spældi hann í KB, sum nú er annað felagið aftan fyri liðið hjá Toda Jónsson, FCK. Hitt felagið er B 1903. Maðurin, sum hetta árið hevði ábyrgdina av KB, var John Kramer, sum bara tvey ár seinni stóð á odda, tá B68 vann sítt fyrsta FM heiti.

Michael Laudrup flutti árið eftir til Brøndby, og so var ein øgilig kapping ímillum stóru feløgini í Europa um, hvør skuldi hava rætin til henda stóra fótbóltsheilan og fótbóltsbeinini, sum vóru so rætt skrúvað saman. Millum mong onnur feløg var Liverpool, men tað endaði við, at Laudrup umveigs Lazio komu til Juventus í Italia. Seinni spældi hann í Barcelona og Real Madrid. Hann varð mettur sum ein hin fremsti spælarin í Europa, og fleiri vóru av teirri áskoðan, at um hann hevði verið á danska landsliðnum, sum vann EM í 1992, so hevði hann verið kosin besti spælarin í Europa hetta árið. Higartil hevur bara ein dani uppnátt henda heiðurin. Tað er venjarin hjá føroyska landsliðnum, Allan Simonsen, sum í 1977 varð kosin besti spælarin í Europa.

Nú eru longu trý ár síðani, at Michael Laudrup gavst á danska landsliðnum, men framvegis er hann ein av mest virdu monnunum í donskum fótbólti. Sum í síni tíð á vøllinum, so er hann eisini uttanfyri vøllin ein gentlemaður. Hann veit, hvat hann tosar um, hann dugir væl at orða seg, og tískil verður tað sjálvandi lurta eftir honum. Tí er tað ikki undur í, at teir báðir føroysku spælararnir í superliguni – í hesum førinum hevur Michael Laudrup neyvan hugsað um Johan B. Hansen sum føroying! – kenna tað sum ein stóran heiður, at hjálparvenjarin á danska landsliðnum hevur havt teir frammarlaga í huganum, tá Ekstrablaðið heitti á hann um at seta eitt lið saman, sum var mannað við bestu útlendsku spælarunum í donskum fótbólti.



*Jákup Mikkelsen er eisini á liðnum, sum Michael Laudrup hevur valt sær*

## Kennir tað sum herðaklapp

Tá Jákup Mikkelsen mánadagin fór til venjingar í Herfølge visti hann, at donsku fjølmiðlarnir høvdu mett hann at vera besta mann á vøllinum, tá Herfølge tapti 2–0 á útivølli ímóti FC Midtjyllandi. Sum vit søgdu í gjár, so var hann av TV3 fótbóltinum sunnukvøldið kosin at vera besti málverjin í Danmark í hesum umfarinum:

– Tað er altíð hugaligt, men eg iðri meg um, at vit ikki vunnu. Vit hava spælt fýra ferðir ímóti FCM í hesum kappingarárinum, og vit hava tapt hvørja ferð. Eg veit væl, at teir nú eru oddalið í superliguni, men eg má siga, at teir hava ongantíð verið sannførandi ímóti okkum. Hesa ferð høvdu vit allar fyritreytir at vinna. Teir høvdu spælt steypadyst hóskvøldið og vóru moyrir. At vit ikki vunnu undirstrikar, at vit eru illa fyri, staðfestir Jákup Mikkelsen.

At Michael Laudrup metti føroyska málverjan at vera besta útlendska málverjan í superliguni, frætti Jákup frá liðfeløgunum, tá hann kom til venjingar.

Tað eru tólv málverjar í superliguni, og av teimum eru fýra útlendingar. Umframt Jákup Mikkelsen er talan um Thomas Myhre, sum stendur í málinum hjá FCK og er norskur landsliðsmálverji, Per Fahlström, sum er í Lyngby málinum, og Arek Onyzko, sm verjir málið hjá Viborg.

– Eg haldi allar útlendsku starvsfelagarnar hjá mær vera góðar málverjar. Í fjør varð Arek Onyzko kosin at vera besti málverjin í superliguni. Tað vóru málverjarnir í superliguni og næstbestu deildini, sum tóku lut í tí atkvøðuleiðsluni. Hann er 27 ára gamal og hevur spælt tveir landsdystir fyri Polen. At Michael Laudrup sigst hava tikið meg framum henda málverjan, taki eg sum ein stóran heiður og eitt orduligt herðaklapp, staðfestir ein lítið látin Jákup Mikkelsen.

Jákup sigur einki um tað sjálvur, men vit gita, at Laudrup leggur stóran týdning í, at ímillum tólv teir bestu málverjarnar í Danmark er Jákup so nógv tann besti fótbóltsspælarin.

Kennir tú Michael Laudrup?

– Ikki meiri enn øll onnur, sum hava fylgt við og fylgja við í donskum og altjóða fótbólti. Tá vit spældu ímóti danska landsliðnum í Gundadali í fjør, heilsaði eg uppá hann.

Jákup Mikkelsen veit ikki, um heiðurin frá Laudrup og Ekstrablaðnum kann brúkast til nakað. Tað er greitt, at hann ikki heldur fram í Herfølge, tá hetta kappingarárið er liðugt. Jákup ynskir ikki at siga nakað ítøkiligt um framtíðina, tí hann sigur, at einki er avgjørt. Men vit kunnu staðfesta, at tað tykist liggja í kortinum, at tað verður ikki í hesum umfarinum, at hann kemur aftur til Føroya.

## Fullkomin spælari

Í blaðnum í gjár søgdu vit, at Michael Laudrup metti Toda Jónsson at vera ein ógvuliga fullkomnan spælara. Tað er ikki so undarligt, tí teir báðir – Michael Laudrup og Todi Jónsson – eru ikki so ólíkir fótbóltsspælarar.

Útlendingaliðið hjá Laudrup er rættuliga framrættað, og Todi Jónsson er settur á ytsta miðvallarplássið í vinstru.

Sjálvandi er hetta ein heiður hjá Toda, sum í hesum døgum umhugsar, hvussu tað skal vera við landsliðnum í framtíðini. Fyrsta fótbóltsfelagið hjá Toda var í Vejle, har hann búði sum smádrongur. Tá hetta herðaklappið kemur frá Laudrup, er ikki torført at ímynda sær, at Todi hugsar um, hvussu tað hevði tørnað út, um hann hevði hildið fram at spæla í Danmark. Sambært Michael Laudrup hevði Todi Jónsson avgjørt verið eitt boð upp á pláss á danska landsliðnum, um hann var dani. Longu í 1991, tá Todi fyrstu ferð umboðaði Føroyar, varð tað avgjørt, at tað varð FSF og føroyskur fótbóltur og ikki DBU og danska landsliðið, sum skuldi fáa ágóðan av fínu evnunum hjá Toda.

Tað eru 43 útlendskir spælarar í superliguni. Av teimum eru tveir føroyingar, og Michael Laudrup heldur teir báðar teljast ímillum teir fyrstu ellivu. Liðið hjá Laudrup í Ekstrablaðnum mánadagin sá soleiðis út: Jákup Mikkelsen, Herfølge/Føroyar – Andrew Tembo, OB/ Zambia, Lars Bohinen, Lyngby/ Noreg, Krister Nordin, Brøndby/Svøríki – Magnus Svensson, Brønsby/Svøríki, Ståle Solbakken, FCK/Noreg, Sibusiso Zuma, FCK/Suðurafrika, Todi Jónsson, FCK/Føroyar – Andres Oper, AaB/Estland, Mwape Miti, OB/ Zambia, Matias Jonson, Brøndby/Svøríki.

Kanska hevði tað verið eitt gott hugskot, um hetta liðið royndi seg ímóti danska landsliðnum, heldur Ekstrablaðið. Fótbóltshugaðir føroyingar kunnu ikki annað enn halda, at tað hevði verið sera spennandi!

## Jákup og Todi á skíggjan

**TV3+ fer at senda beinleiðis frá dystinum millum Herfølge og FCK**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Av heimasíðuni hjá FCK frættist, at dysturin millum Herfølge og FCK verður fluttur.

Upprunaliga skuldi dysturin spælast kl. 15.00 tann 13. mei, men nú sjónvarpsrásin hevur gjørt av at senda beinleiðis frá dystinum, verður hesin ístaðin fluttur til klokkan 17.05.

Sostatt ber til hjá teimum føroyingum, sum hava møguleika at síggja TV3+, at fylgja við, hvussu leikur fer, tá teir báðir føroyingarnir fara at dystast. Møguliga verður tá talan um ein dyst millum komandi á fráfarandi meistararnar, men tað er helst ov tíðliga at siga nakað um enn.